Góðu tit øll.

Fyri eini tíð síðani var eg og hugdi eftir filminum “I am Malala”. Hesin var sýndur í Havnar bio, og nøkur av tykkum hava nokk eisini sæð hann.

Filmurin “I am Malala” vísir dømi um, hvussu milliónir av gentum hava tað út í heiminum.

Malala kempaði fyri rættindunum hjá gentum at ganga í skúla í heimlandinum-Pakistan. Men tað var ikki væl dámt av øllum har, og als ikki av Talibanunum, sum har eru.

Mótstøðan móti, at gentur skuldu ganga í skúla, var so stór, at einaferð bleiv Malala skotin í høvdið, men yvirlivdi kortini og mátti flýggja.

Men hvat hevur Malala við altjóða kvinnudag at gera?
Jú, altjóða kvinnudagur, sum verður hildin um allan heim í dag, er dagurin har kvinnur vísa á rættindi, sum tær hava kempað og framvegis kempa fyri. Og Malala er dømi um eina gentu, sum í sínum heimlandi royndi at geva gentum rætt til at ganga í skúla.

Hugskotið um altjóða kvinnu dag byrjaði í 1910 í keypamannahavn á eini rástevnu fyri kvinnur. Síðani hesa ráðstevnu í 1910 hava kvinnur fingið meira og meira rættindi serliga her í Evropa og í Amerika. So stór framstigi eru hend viðvíkjandi kvinnurættindi,  at nøkur halda at kvinnu- og mannfólkarættindi eru komin á mál. Men í teimum døgum, tá ið hugskotið um altjóða kvinnudag kom, fyri uml. 100 árum síðani, tá var støðan øðrvísið. Tá var trupulleikin m.a, at kvinnur ikki sloppu at velja politikkarar, - hvørki til Fólkatingið ella til Løgtingið.

Tær sloppu heldur ikki at arbeiða í sama mun sum í dag. Og um ein kvinna arbeiddi, so fekk hon bert uml. helvtina av tí í løn, sum maðurin fekk, fyri sama arbeiði. Var kvinnan gift, so slapp hon í flestu førum ikki at arbeiða fyri løn.

Eisini vóru tað fleiri størv, sum vóru ólóglig hjá kvinnum at hava yvirhøvur. T.d sloppu kvinnur í Føroyum ikki at verða prestar, tær sloppu heldur ikki at verða yvirordnaðir ella leiðandi løgfrøðingar ella politikkarar, tað var eisini ólógligt. Men tó var ein lóg gjørd í 1907 um, at kvinnur sloppu at LÆRA til prest. Men ikki fyrr enn 40 ár seinni - í 1947 - varð lógin broytt, so tær eisini sloppu at ARBEIÐA sum prestar.

1960-ini og 70-ini , var ein tíð, har kvinnur framvegis sera ofta fingu nógv lægri løn enn menn fyri sama arbeiði, og tað var ikki vanligt, at kvinnur arbeiddu úti, um tær vóru giftar. Arbeiddu tær á flakavirki ella í handli saman við monnum, so fingu tær bert HELVTINA í løn av tí, sum maðurin fekk, eisini um tær gjørdu tað sama arbeiði. Hetta var eisini ein av orsøkunum til ungdómsuppreisturin sum byrjaði í 1968 um alt Evropa; Tað var ikki líka ógvusligt í Føroyum sum aðrastaðni, men sást m.a. aftur í Føroyum innan fakfelagsarbeiði. Har var tað serliga ein kvinna, ið æt Andrea Árting, sum var forkvinna í Havnar Arbeiðskvinnufelag, sum stríddist fyri, at menn og kvinnur skuldu fáa líka løn fyri sama arbeiði. Tað var eisini í 1970unum og 80unum, at kvinnur komu meira og meira út á arbeiðsmarknaðin.

Í eini tíð har pør fingu nógv børn og ongir barnagarðar vóru, so var alneyðugt, at onkur var heima og passaði heim og børn. Hesa uppgávuna átók kvinnan sær vanliga. Men so hendi nokkso nógv í 1980-unum, so nógv at brúk var fyri at kvinnurnar komu út at arbeiða.

Í dag er ein kvinna, sum ikki arbeiðir, antin á barsil ella er hon arbeiðsleys. Soleiðis var ikki fyri bara 30 / 40 árum síðani. Tá var hvørki barsilsskipan ella arbeiðsloysisskipan í Føroyum. Hevði tú ikki arbeiði sum gift kvinna, so vart tú ikki arbeiðsleys, men tú vart heimagangandi. Soleiðis hevur støðan ment seg heima hjá okkum og um okkara leiðir. Vit, sum eru ungar gentur í dag í Føroyum, halda at tað er ein sjálvfylgja at vit sleppa at ganga í skúla, at vit

seinni sleppa at taka eina útbúgving og enntá sleppa út at arbeiða. Men soleiðis er ikki allastaðni. Tað eru enn í fleiri londum, at kvinnur ikki sleppa at ganga í skúla, at tær ikki sleppa at arbeiða fyri pengar, og fleiri milliónir kvinnur og gentur verða á hvørjum ári seldar til onnur at brúka, og er arbeiði teirra tá ofta at verða trælir av ymsum slag. Hesar duga ofta hvørki at lesa ella skriva og eru tí sera illa fyri.

So hóast vit ganga í einum stórum, vøkrum og nýmótans skúla her í Skúlanum við Løgmannabreyt við 78% kvinnuligum lærarum, so eru tað nógvar kvinnur og gentur úti í verð, sum eru trælir ella arbeiðsleysar. Um altjóða kvinnudagur í Føroyum og í Norðurlondum, ikki hevur sama týdning, sum hann hevði fyri 100- 50 og fyri 30 árum síðani, so eiga vit, at brúka dagin til at varpa ljós á tær umstøður sum okkara medmenniskju úti í verðini liva undir, og eiga at gera alt fyri, at tær og tey koma at hava tað betri.

Sjálv haldi eg at øll. Bæði gentur og dreingir, í øllum heiminum skula hava atgongd til at ganga í skúla.

Eg fari við hesum orðum at ynskja tykkum øllum ein góðan kvinnudag.

Brynhild Pálsdóttir, 14 ár.